


**Nr. 11** **23. mai 2021** **81. árg.**

# Jesus Kristus
## – miðdepil lívsins

Flestir lutir hava eina byrjan, og tað hevði kristiliga lívið eisini. Tó skal ikki verða sagt, at hetta kom brádliga. Nei, tað kom í smáum. Men tó var ein týðilig byrjan. Tá ið vit líta eitt sindur aftur um bak, var tað ein størri og hendingaríkari roynd, enn eg tá skilti. Hetta broytti allan hugsanarhátt mín og legði lívi mínum eina aðra kós.

Tó at eg vaks upp í kristiligum umhvørvi, helt eg, at evangeliið var ógvuliga undarligt. Hví skuldi so nógv verða talað um krossin og líðing Krists? Gekk vegurin til himmals bara gjøgnum hetta? Viðvíkur hetta á nakran hátt mær? Men smátt um smátt vórðu spurningar mínir svaraðir gjøgnum bøkur og eisini prædikur, eg lýddi á.

Eg skilti, at tað var á krossinum, at Jesus doyði tann deyða, eg hevði uppiborið vegna syndir mínar. Vegurin til himmals var opin, av tí at Jesus doyði á krossinum. Tað, eg skuldi gera, var at venda mær burtur frá synd og taka ímóti tí frelsu, sum Jesus hevði vunnið mær og nú bjóðaði mær.

Men so kom ein annar trupulleiki. Hvussu hevði verið, um alt hetta ikki hevði verið veruleiki, og eg bara var ein dári? Vóru ikki mangir aðrir átrúnar í heiminum? Kanska var bara ein teirra hin rætti? Teir vóru eisini vísir í, at teirra læra var hin rætta. Mangar spurningar havi eg ikki fingið svaraðar fyrr enn hesa seinastu tíðina, og enntá nú havi eg ikki fingið allar svaraðar. Men tað, sum sannførdi meg, var, at tað veruliga var

ein persónligur Gud og frelsari, og at evangeliið hóskaði til allan mín tørv. Eg vildi av heilum huga sleppa í himmalin.

So kom hitt kvøldið, sum eg ongantíð gloymi. Møti vórðu hildin í tvær vikur í einum bóndagarði nærindis húsum okkara. Løðan var nýkálkað til møtini. Á veggjunum hingu alskyns amboð. Eitt lítið borð var prædikustólur. Fríggjadagin fyrru vikuna sat eg aftastur í løðuni. Boðskapurin gekk mær at hjarta, og mær rann í huga, at eg hevði spælt ov leingi við mína frelsu og Guds náði.

Tá ið møtið endaði, nevndi eg smæðin, at eg vildi verða frelstur. Bønarløtuna aftaná bað eg við fáum orðum, men ærliga, um, at Harrin Jesus vildi taka burtur syndir mínar og koma inn í lív mítt. Næstan alt fyri eitt fekk eg vissu fyri, at eg var frelstur. Eg leit á tað, sum Kristus hevði gjørt fyri meg, og eg vónaði, at hann vildi útinna í lívi mínum alt tað, sum hann hevði lovað okkum í Bíbliuni.

Eg fekk tann hjartafrið, sum bara Gud megnar at geva. Men eg stúrdi fyri, at eg ikki altíð fór at verða líka áhugaður fyri tí, Gudi hoyrdi til, sum eg var nú. Men Harrin tók eisini burtur hesa stúran við lyfti sínum í Jes 46,4: „Alt at ellisárum eri eg hin sami; eg beri tykkum, til hárini á tykkum grána; eg lyfti og fari undir tykkum, eg beri og bjargi tykkum."

Ikki fyrr enn eg var frelstur, var allur trupulleiki mín, at eg mátti fáa syndir mínar fyrigivnar og gerast búgvin til himmalin. Hetta havi eg so avgjørt ikki gloymt, men havi eg so við og við lært, at denturin ikki so nógv skal verða lagdur her ella at fáa allar spurningarnar svaraðar. Fyri mær er miðdepilin í evangeliinum Jesus Kristus – ikki eitt navn í søguni ella eitt áhugavert sermerki í Bíbliuni, men ein livandi, veruligur persónur, sum er leiðvísi mín, frelsari mín og Gud mín.

Eg havi funnið, at tann meistarin, eg royndi at fylgja, tá ið eg varð umvendur, hevur verið nógv størri, ríkari, kærligari, enn eg á nøkrum sinni hevði hugsað var møguligt.

*t. hansen* umsetti.

---

**Hvat skal eg gera við Jesus?" spyr Pilatus.** Hetta er heimsins týdningarmesti spurningur. Okkara samband við Jesus er avgerandi fyri lív og deyð. Gud pjøssar ikki tey brotnu pettini saman ella setir eitt plástur á sárið. Hann gevur okkum eitt heilt nýtt lív. Og tað kanst tú fáa nú.

*e.c.* ums.

# Hin glitrandi gullgøtan

Nils Johan Thorsell og ein annar maður fóru at vitja bygdirnar uppi í Finnmørkini. Nils Johan skuldi tala og savna stuðlar til norsku sjónvarpsstøðina Kanal 10. Hin maðurin var ein upptøkumaður, hann tók upp filmar, sum skuldu sendast á rásini.

Í einari av bygdunum filmaðu teir ein mann, sum kom við sínum sterka vitnisburði:

„Tað var stutt eftir, at eg var umvendur. Eg kendi brádliga eina sterka áminning, at eg skuldi biðja. Eg visti ikki, hvørjum eg skuldi biðja fyri. Eg setti meg inn í bilin og koyrdi spakuliga avstað. Tá ið eg kom til kirkjuna mitt inni í hesi bygdini, hugsaði eg, at eg skuldi fara inn í kirkjuna at biðja. Tá sá eg ein mann, sum gekk beint móti kirkjuhurðini. Eg fór so aftan á honum. Hetta vísti seg at vera ein kirkjutænari. Eg spurdi, um eg kundi seta meg í kirkjuna eina løtu at biðja. Jú, gaman í. Eg setti meg á fremsta bonk at biðja. Tá ið eg so skuldi reisast, kemur hesin maður ímóti mær og spyr, um eg kann biðja fyri konu síni, tí hon er ógvuliga sjúk. Eg bað so fyri henni. So reistist eg og fór út. Eg setti meg ikki inn í bilin, men fór framum og stillaði meg við framhjólið, tí eg kendi á mær, at eg skuldi biðja einaferð afturat. Mitt undir bønini kemur tað til mín, um henda konan mundi vera frelst. „Tí bað eg so: „Harri, vís mær, um henda konan hevur síni viðurskifti í lagi við teg."

Tá alt í einum sá eg eina sjón. Beint undir liðini á mær sá eg eina glitrandi gullgøtu, sum gekk heilt upp í luftina. Tá visti eg, at hetta var ein frelst kona, men eg visti eisini, at hon kom at doyggja av hesi sjúku, sum hon hevði. Hetta er sterkasta upplivingin, eg nakrantíð havi havt," endaði maðurin.

*Effie Campbell.*

---

**Dánjals Bók er heimssøgan,** skrivað frammanundan. – Profetiini hava nógv at siga:

„Nei, Harrin, drottin, ger einki uttan at birta loyndarráð síni fyri profetunum, tænarum sínum." Ámos 3,7. – 700 profeti um Jesus, sum standa í Gamla Testamenti, eru uppfylt. Tí fáa vit áminningina at LESA Guds orð. „Legg tær, inntil eg komi, eina við UPPLESTRINUM, áminningini, læruni." 1. Tim. 4,13.

*e.c.* ums.

# Blá eygu

„Hvat er maður, at tú minnist á hann? Ella mansbarn, at tær kemur tað í hug? Lítið lægri enn einglarnar, tú gjørdi hann; við æru tú hevur krýnt hann“ (Hebr 2, 6–7).

Ein lítil, ensk genta hevði í mong ár biðið Gud um at broyta morreyðu eygu síni til blá eygu. Mong ár seinni stríddist hon sum trúboði í India at fáa tey innføddu at líta á seg. Hon læt seg í sum tey og hevði stóran áhuga fyri teirra trupulleikum, men kortini vildu summi ikki góðtaka hana.

Ein dagin hoyrdi hon tvær konur tosa saman. Onnur segði: „Eg veit, hvussu vit kunnu vera viss í, at hon er ein okkara – eygu hennara. Allir evropearar hava blá eygu.“

Amy Carmichael mintist bønirnar, hon bað sum barn, smíltist og takkaði Gudi, tí at hann hevði givið henni morreyð eygu og ikki blá.

Vit vilja mangan vera øðrvísi, enn vit eru, ein sterkari persónsmenska, ella at vit vilja hava fleiri evni. Vit kenna á okkum, at lívið hevði verið nógv áhugaverdari og undurfullari, um vit kundu fingið tað, sum onnur eiga. Men Gud hevur eina ætlan og eitt endamál, tá ið hann skapaði okkum, sum hann gjørdi.

Ætlan hansara við okkum er líka egin sum okkara persónsmenska. Hann sær vegin fram hjá okkum, og tá ið vit laga okkum eftir leiðslu hansara, skulu vit skilja, hvussu fullkomin henda ætlan var, sum hann legði í lív okkara.

Faðir á himni, vit fara skeiv, um vit sjálv leggja lívsveg okkara. Leið tú okkum eftir fullkomnu ætlan tíni.

*t. hansen* ums.



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum eina gleðiliga hvítusunnu***

***Heilsan** blaðstjórin.*



## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 23. mai | Tekstur: Áps. 2,1-18 | bíbliuorð: Áps. 1,8 |
| 30. mai | Tekstur: Áps. 2, 40-47 | bíbliuorð: Gal. 2,20 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 12*** ***6. juni 2021*** ***81. árg.***

# Virkandi bøn

*Men hann talaði eitt líknilsi til teirra um tað, at teir áttu at biðja og ikki troyttast (Luk 18,1).*

Tá ið vit lesa um tey menniskju, sum hava verið stór í bønarlívi sínum, fær tað okkum at ynskja, at bønir okkara mega hava størri ávirkan. Tað er neyðugt, at vit skilja betur, hvussu neyðugt tað er at biðja tílíkar bønir.

Í hesum skundmiklu tíðum eru mong, sum ikki taka sær stundir at biðja. Men vilja vit, at verk Harrans skal ganga fram, mega vit hvønn dag taka okkum stundir at biðja. „Men latið í øllum lutum tráan tykkara koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk“ (Fil 4,6).

Fara vit aftur í søguna, hoyra vit um bønarhetjur. Tey hoyrdu John Knox biðja: „Gev mær Skotland, ella doyggi eg!“ George Whitefield bað: „Gev mær sálir, ella tak mína!“ Brainerd segði meira enn eina ferð um seg sjálvan: „Eg stúrdi ikki fyri, hvussu eg livdi, ella hvørjar trupulleikar eg mátti fáa, alt meðan eg kundi vinna sálir til Krist.“

Tá ið tey, sum sótu við songina, har David Stoners lá at doyggja, hildu, at andin var farin úr likaminum, reistist hann í songini og segði: „O, Harri, frels syndarar! Frels tey í hópatali! Frels fleiri hundrað, frels tey í túsundtali!“ Tann ovurhugi og umsorgan, sum hevði vald á honum í lívinum, vóru eisini sterk í deyðanum.

Stríðast vit í bøn fyri farnum sálum? Harrin hjálpi okkum at skilja lagnu teirra, sum um allar ævir eru glatað. Gævi, at okkara dagliga bøn verður: „Gud, legg á okkum eina tyngri byrðu, sum er at hugsa meira um frelsu menniskjans!“

„Megnað bøn av rættvísum manni er mikið ment“ (Ják 5,16).

„Um tveir av tykkum eru samsintir á jørðini um at biðja um okkurt, tá skal tað verða teimum givið av faðir mínum“ (Matt 18,1).

*t. hansen* ums.

# Gripin av Kristi

Tað fyrsta, sum eg hevði áhuga fyri, var fótbóltur. Líka frá barnaárum var tað at sparka fótbólt meira spennandi enn nakað annað. Eg hevði tann forrætt at verða føddur í einum góðum heimi. Tó at tað at ganga í sunnudagsskúla var okkurt, sum eg mátti gera, so var tað fótbólturin, sum valdaði í huga mínum, og eg droymdi um, at eg einaferð skuldi gerast ein gitin fótbóltsspælari.

Tá ið eg fór úr skúlanum fimtan ára gamalur, fór eg at ráða yvir mínum egna lívi og ganga mínar egnu vegir. Og soleiðis var úr, at samband mítt við kirkjuna næstan helt uppat. Kristindómurin var fyri mær bara okkurt veikt, sum als ikki megnaði at stimbra mín áhuga og vinna mítt unga hjarta. Eg kendi heldur ikki nakran, sum hugsaði um at liva fyri Gudi.

Sum frá leið, kom eg upp í stuttleikalívið og royndi at fáa lut í tí gleði, sum heimurin bjóðaði okkum. Men mangan grundaði eg um spurningar, sum ørkymlaðu meg; men eg var noyddur at skúgva teir til viks, tí eg kendi ongan, sum tóktist at hava funnið svarið. Deyðin tóktist veruligur, og lívið – enntá longsta – so stutt. So eg ognaði mær hina vanligu áskoðanina: „Latið okkum eta og drekka og vera glað. Tú skalt njóta lívið, meðan tú eigur tað.“ Tá visti eg ikki, at tað bara er Gud, sum megnar at nøgta hina langtandi sálina og fylla hin hungraða við góðsku.

Eg hevði ongantíð mist trúnna, at Gud er til og skilti, at tað vóru føri í lívinum, at tørvur var á kirkjuligari hjálp. Tí var tað eyðsæð, at tað var skilaligt, at eg fekk frálæru, sum miðaði ímóti limaskapi í kirkjuni. Eg hevði gingið í tólv vikur, men alt tóktist so óveruligt, so eg gjørdi av at bíða við hesum limaskapi. Eg visti ikki, at hitt kristiliga lívið er bundið at tí, at vit skulu kenna Harran Jesus Krist sum okkara persónliga frelsara. Men Harrin var farin at leiða meg út til frælsi.

Eitt vikuskifti, eg var burturstaddur, hitti eg ein ungan mann, sum hevði áhuga fyri mær. Hann vitnaði fyri mær um

trúgv sína á Jesus Krist. Tað er torført, nú sjey ár eru liðin, at minnast neyvt, hvat tað var, vit høvdu saman. Men høvuðsevnið, tá ið vit leingi høvdu tosað saman, mangan frá kvøldi til tíðliga á morgni, var Jesus, og hvønn týdning tað hevði at vera frelstur. Ein ljósglotti rámti hjartað, men tað var nóg mikið at lata Gud koma inn í lív mítt. Eg visti ikki, hvussu eg skuldi biðja, men við fáum orðum bað eg Jesus koma inn í hjarta mítt, frelsa meg og skapa okkurt nýtt.

Hetta kundi tókst lítið vert, men eg trúði, at Gud hoyrdi bøn mína, og eg fór at siga øðrum, at eg var vorðin kristin. Eg las hvønn dag í Bíbliuni og bað til Gud, og eg gjørdist bilsin at uppliva ta broyting, sum Gud gjørdi í lívi mínum. Tað, sum eg fyrr hevði sett so høgt og hildið so fast um, mátti víkja fyri øðrum lutum. Allur hin verðsligi stuttleikin dró meg ikki longur – eg hevði fingið okkurt betri. Sum tað er satt, ið Bíblian sigur: „Um onkur er í Kristi Jesusi, er hann vorðin ein nýggjur skapningur, hitt gamla er farið – alt er vorðið nýtt.“

Ikki vardi leingi, fyrr enn eg skilti tað, at Gud hevði eina ætlan við lívi mínum, og at ætlan hansara var hin besta fyri meg. So væl sum eg skilti tað, yvirgav eg meg sjálvan til hansara, so eg ikki skuldi hava nakað at iðra meg um tann dagin, eg skuldi standa til svars fyri lívi mínum. Nú, ið útbúgving mín er at enda komin, havi eg byrjað tann gerning, sum Harrin hevur kallað meg til.

*t. hansen* umsetti.

# Um gávur og Guds gávu

Soleiðis stendur um Sámáriukonuna: „Men Jesus mátti leggja ferð sína gjøgnum Sámária.“ Her var eingin óvissa ella drálan. Hvør er henda noyðandi kraftin, sum fær Guds son at eyðmýkja seg, so hann biður eina burturrikna konu geva sær vatn? Hann er sjálv keldan við livandi vatni. Jú, hann hevur sæð okkara stóra tørv at fáa felagsskap, og hann tystir brennandi eftir at býta út av yvirflóð síni. Sí, hvussu hann ber seg at! Fyrst biður hann hana geva sær vatn, fyri at hann skal fáa høvi at geva henni livandi vatn.

Hann letur ikki hennara hástóra og óblíða atburð forða sær. Hoyr blídligu orð hansara: „Um tú kendi Guds gávu, og

hvør hann er, sum sigur við teg: gev mær at drekka, tá mundi tú biðið hann, og hann hevði givið tær livandi vatn."

Hjá Gudi er gávan ikki ein olmussa, ein lættur háttur at sleppa frá einum neyðugum tørvi. Gávan er bara at fáa í lag eitt samskifti, ein møguleiki at kunna geva sítt egna, ríka hjarta.

Gávan er eitt náðievni, sum boðar frá náði, kærleika, lívi, kraft. Gávan skal fría, ikki binda. Guds gáva er ongantíð ein roynd at binda nakran í takksemi. Gávan er ein hjartalig trongd at sleppa at geva. Gevarin gevur sjálvan seg í gávuni. Eitt yndisligt dømi! Bara fullkomin gáva kemur úr erva, frá ljósanna faðir.

Og konan, sum upplivir alt hetta, hvat ger hon? Skrivað stendur, at hon læt vatnkrukkuna standa. Eina løtu gloymdi hon alla dagliga stúran og allan ótta. Hon hevði fingið ein nýggjan tørv: at hava hetta saman við øðrum, sum hon sjálv hevði upplivað, at leita eftir teimum, sum hon beint tá hevði komið sær undan at møta.

Tá ið hon viðgekk sína synd, fekk hon felagsskap við menniskju. Tá ið hon hevði fingið fyrigeving, fekk hon eina uppgávu. Falsloysi, sannleiki og eyðmýkt gjørdu hana til mannafiskara.

Tá ið vit hava møtt kærleikanum, kunnu vit lata vatnkrukkuna standa – ímynd okkara um ótta – og við hjartanum fullum av miklari gleði og ídni siga øðrum frá okkara samrøðu við Jesus. Og hetta er hitt æviga lívið – at læra Jesus Krist at kenna og gera hann kendan. Tann, sum trýr á Jesus, úr lívi hansara skulu renna livandi vatnstreymar, sigur hin heilaga skriftin.

*t. hansen* ums.

---

Evangeliið er: fyrigeving fyri fortíðina, eitt nýtt lív í dag, og vón fyri framtíðina. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6. juni | Tekstur: | Áps. 3,1- 11; 4, 7-10 og 1 Kor 12,4-6 | bíbliuorð: | Sl. 13,6 |
| 13. juni | Tekstur: | Áps. 4,1-20 | bíbliuorð: | Áps. 4,20 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74